# NÁTTBUSSURIN
## Á ÓLAVSØKU

### VESTMANNALEIÐIN:

| Týsdagin 27. juli 2004 | |
|---|---|
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 22.00 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 23.00 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 00.30 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 03.30 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.30 |

**Fráferð úr Tórshavn - "City Burger"**

| Ólavsøkuaftan 28. juli 2004 | |
|---|---|
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 14.00 |
| Heimaftur eftir steypahandanina av | Bursatanga |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 22.00 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 23.00 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.00 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 05.00 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 06.00 |

**Fráferð úr Tórshavn - "Bursatangi"**

| Ólavsøkudag 29. juli 2004 | |
|---|---|
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 22.00 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 23.00 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.00 |
| Vestmanna - Tórshavn | kl. 05.00 |
| Tórshavn - Vestmanna | kl. 06.00 |

**Fráferð úr Tórshavn - "Bursatangi"**

### VÁGAMANNALEIÐIN:

| Týsdagin 27. juli 2004 | |
|---|---|
| Tórshavn - Vágar | kl. 04.30 |

**Fráferð úr Tórshavn - "City Burger"**

| Ólavsøkuaftan 28. juli 2004 | |
|---|---|
| Tórshavn - Vágar | kl. 04.00 |
| Tórshavn - Vágar | kl. 06.00 |

**Fráferð úr Tórshavn - "Bursatangi"**

| Ólavsøkudag 29. juli 2004 | |
|---|---|
| Tórshavn - Vágar | kl. 04.00 |
| Tórshavn - Vágar | kl. 06.00 |

**Fráferð úr Tórshavn - "Bursatangi"**

**Fríggjadagin 30. juli og leygardagin 31. juli, verður koyrt sum vanligt við fráferð frá City Burger**

**Koyrt verður øll kvøldinium Kvívík og Kollafjørð**

**TEL 42 42 54 · FARTEL 21 77 52**

# Klinikkassistentur

Søkt verður eftir klinikkassistenti at byrja mánadagin 23. august 2004.

Talan er um fulltíðarstarv.

Við útbúgving hava fyrimun.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. august 2004.

**Tannlæknastovan Hjá Unnur Jensen**
Varðagøta 26
Box 3142 · 110 Tórshavn

**SUNNUDAGSDØGURÐI Á HOTEL NORÐ**

**Sunnudagin 25. juli er matarskráin hendan:**

**Forrættur:**
Rómaligerað asparges suppa v/flutes

**Høvuðsrættur:**
Heilstokt oksafilet v/bátaeplum og hvítum eplum, grønsaks sauté, grønmeti og sherrysós

**Dessert:**
Stór kakubuffet við kaffi, er at fáa allan sunnudagin

**Kostnaður: 175,-**
**(børn kr. 80,-)**

**Ring og bílegg borð á tel 45 12 44**





**Hotel Norð**
WWW.HOTELNORD.FO · TEL 45 12 44

Sosialurin 341800





NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

**SUMMARFRAMSÝNINGIN 2004**
**Í KLINGRUNI, DANSISTOVUNI OG Í FORHØLLINI**

Listaverk hjá Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir, Anker Mortensen, Annie Heinesen, Jógvan Biskupstø, Martin Nolsøe Simonsen, Svanhild Strøm, Tummas Jákup Thomsen og Vígdis Petersen

Húsið er opið hesar tíðir um Ólavsøkuna:
Ólavsøkuaftan 28. Juli 14-20
Ólavsøkudag 29. Juli 14-20
Fríggjadagin 30. Juli 14-18

Í kaffistovuni er høvið at keypa breyð við føroyskum og útlendskum viðskera, heimabakaðir køkur, kaffi, te, øl og sodavatn.

Atgongumerkir til tiltøkini í sambandi við Listastevnu Føroya frá 6.-15. august, eru at fáa í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum.

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Tel 317900 · Fax +319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo; http://www.nlh.fo**

Sosialurin 341800

# Avgreiðslufólk

Til Farodane City sóknast vit eftir avgreiðslufólki innan skrivstovulutir at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøki:**
Sum partur av skrivstovumarknaðinum Farodane City fevnir starvsøki fyrst og fremst um sølu og tænastu innan skrivstovulutir - bæði við telefonavgreiðslu og í handlinum.

Saman við handilsleiðaranum kemur tú herumframt at hjálpa til við bíleggingum, vøruúrvæli, søluátøkum og aðrari menning av handlinum.

**Fyritreytir:**
Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og handil, við fyrimuni innan skrivstovulutir. Viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur, tó at størstur dentur verður lagdur á at tú ert fyrikomandi og skyldurøkin. Herumframt vænta vit at tú ert teldukøn/ur á vanligum brúkarastøði.

**Vit kunnu bjóða:**
Tú kemur í eitt avbjóðandi starv, har tú fært eina sølu- og vøruúrvalsvenjing á høgum støði. Saman við nærum 50 starvsfeløgum kemur tú at mynda eina gamla, men nútímans fyritøku í støðugari menning.

Løn verður ásett í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn saman við viðmælum/prógvum skal verða okkum í hendi seinast mánadagin 26. juli 2004.

**FARODANE City**
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR

*Farodane er 54 ára gamalt handils- og tænastuvirki, sum í dag er millum landsins fremstu heildarveitarar til skrivstovuna.*

*Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, skrivtovuinnbúgvi, skrivstovulutum, umframt skeiðstovuna Kvasir.*

Umsókn skal sendast til:

FARODANE P/F
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

# Runavíkar Skúlanevnd

Søkt verður eftir lærara til at undirvísa 12 tímar um vikuna alt skúlaárið 2004/2005.

Talan er um avlopstímar, og í tímatalvuni eru 12 tímar við dreingjaítrótti.

Starvið er lønt samb. sáttmála ímillum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 1. agusut 2004.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 447956/217331 ella 449975.

**f. Runavíkar Skúlanevnd**
Malan Rasmussen, tlf. 441842
Niðari Vegur · FO-660 Søldarfjørður

# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

# Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

# Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045




# Fara at kanna málið um nýggja skúlastjóran

**Tjóðveldisflokkurin fer at kanna, hvussu tað ber til, at Jógvan á Lakjuni hevur sett Hans Johannus á Brúgv í starvið sum nýggjur skúlastjóri, hóast Gestur Hovgaard varð mettur at vera betri skikkaður**

STARVSSETAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er sjálvsagt eitt mál, sum vit fara at kanna nærri.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins undrast á mannagongdina, nú Jógvan á Lakjuni hevur sett Hans Johannus á Brúgv í starvið sum skúlastjóri fyri sjómannaskúlan og maskinskúlan.

Eitt er í hvussu so er heilt greitt: Seinasta orðið er ikki sagt í tí málinum enn.

Tað eru annars Tórbjørn Jacobsen og Heidi Petersen, sum eru talsfólk fyri tjóðvldisflokkin í slíkum málum, men hvørgin teirra hevur verið at hitta.

Sjálvur kennir Høgni Hoydal ikki nógv til málið, men hann sigur, at sjálvandi fer flokkurin at kanna starvssetanina nærri.

Hann hevur hug at samanbera hesa starvssetanina saman við málið, tá ið Annlis Bjarkhamar setti Steffen Stumman Hansen til landsfornfrøðing, hóast setanarnevndin metti, at Símun Arge var best skikkaður.

Annlis Bjarkhamar legði dent á nøkur onnur viðurskifti enn setanarnevndin gjørdi og tað var orsøkin til, at hon gekk upp á tvørs av setanarnevndini.

– Tá varð staðfest, at Annlis Bjarkhamar hevði borið seg rætt at. Somuleiðis staðfesti Løgtingsins umboðsmaður, at hon hevði onki skeivt gjørt. Kortini mátti hon leggja frá sær.

– Høgni Hoydal sigur, at uttan at hann kennir hetta málið út í æsir, tykist tað sum um at nú hevur Jógvan á Lakjuni gjørt akkurát tað sama og tað er eitt mál, sum má kannast.

– Hetta er eitt rættiliga prinsipielt mál: Teir flokkar, sum nú eru í samgongu gjørdu rættiliga nógv burtur úr málinum um fornfrøðingin og tað endaði við at løgmaður sum var, koyrdi landsstýriskvinnuna frá væl stuðlaður av javnaðarflokkinum.

– Tað ljóðar sum at tað kunnu dragast neyvar samanberingar imillum hetta málið og málið um fornfrøðingin og tað vilja vit hava greiði á.



*– Sjálvsagt fara vit at kanna, hví Jógvan á Lakjuni sleppur væl frá at ganga ímóti setanarnevndini, tá ið Annlis Bjarkhamar skuldi koyrast frá fyri tað sama, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins*

Høgni Hoydal sigur, at hann vil hava at vita um um tað eru aðrar treytir galdandi fyri landsstýrisfólk hjá tjóðveldisflokkinum enn fyri onnur landsstýrisfólk.

– Tá ið fornfrøðingurin var fyri, gjørdi bæði fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin rættiliganógv burturúr og skuldsetti landsstýriskvinnuna fyri at hava brotið starvsfólkapolitikkin, tí at hon ikki hevði fylgt setanarnevndini.

– Tí virkar tað ómetaliga løgið, at bara tað nú er í lagið, at ein landsstýrismaður kann gera tað sama, uttan at tað fær avleiðingar, sigur Høgni Hoydal.

# Ongin orsøk at nýggi stjórin skal elva til rok

**Jóannes Eidesgaard sigur, at setanarpolitikkurin er hildin og tí tekur hann avgerðina hjá Jógvani á Lakjuni til eftirtektar**

STARVSSETAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eg dugi ikki at síggja, at nakað skeivt er farið fram.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, væntar ikki somu gølu einaferð afturat, nú nýggjur stjóri er settur fyri samanløgdu sjómannsskúlan og maskinmeistaraskúlan.

Tað hevur vakt ans, at landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur sett Hans Johannus á Brúgv í starvið sum stjóri fyri báðar skúlarnar.

Tað hevur hann gjørt, hóast ein samd setanarnevnd metti, at Gestur Hovgaard, var betri skikkaður.

Og so eru tað mong, sum eru farin at draga samanberingar ímillum hetta málið og eina aðra starvssetan, sum elvdi til mikið rok. Tað var, tá ið ein annars landsstýrismaður í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, setti Steffen Stumman Hansen í starvi sum landsforngfrøðing, hóast setanarnevndin einmælt mælti til at seta Símun Arge.

Jógvan á Lakjuni hevur kunnað landsstýrið um avgerðina.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá landsstýrismanninum sjálvum.

Men Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum hevur eftirlitið við landsstýrismonnunum, heldur ikki, at tað er nakað at finnast at.

Hann sigur, at hann hevur spurt um málið hjá landsstýrismanninum. Og soleiðis sum málið er lagt fram fyri hann, er setanarpolitikkurin hjá tí almenna hildin út í æsir.

Tá ið setanarnevndin gjørdi sína innstilling metti hon, at tveir av umsøkjarunum vóru skikkaðir til starvið: Hans Johannus á Brúgv og Gestur Hovgaard.

– Tá ið setanarnevndin sigur, at hon metir at tveir umsøkjarar eru skikkaðir, hevur hon samstundis givið landsstýrismanninum ein møguleika at velja.

Men nevndin hevur eisini mett, at Gestur Hovgaard betri skikkaður til starvið.

## Setir starvið einsamallur

Løgmaður staðfestir, at tað er landsstýrismaðurin, sum er einsamallur setanarmyndugleiki.



*– Jògvan á Lakjuni hevur tikið eina avgerð og tað hevur hann rætt til, so leingi fortreytirnar eru sakligar, sigur Løgmaður*

– Og hann hevur so lagt dent á aðrar, sakligar fortreytir. Og sakligar fortreytir eru fortreytir, sum eru lýstar í starvslýsingini. Tað kann verða útbúgvingar, leiðsluroyndir og annað.

– Sostatt hevur landsstýrismaðurin gjørt av at leggja dent á nøkur onnur saklig viðurskifti, enn enn setanarnevndin hevur lagt dent á.

– Hetta er eitt avgerð, sum hann hevur rætt at taka.

– Landsstýrismaðurin eigur avgerðina og hann hevur sett starvið útfrá nøkrum fortreytum, sum eru sakligar og sum hann heldur hava týdgning.

Løgmaður sigur, at hann metir, at eftir tí, hann hevur fingið upplýst, er talan sostatt ikki um nakað sum helst brot á almenna setanarpolitikkin.

Og einasta uppgávan hjás løgmanni í hesum málið er at tryggja, at setanin er farin fram sambært galdandi setanarpolitikkinum og tað metir hann at hon er.

Annars hevur løgmaður ikki hug at bera hetta málið saman við málið um landsfornfrøðingin. Hann kennir ikki smálutirnar í tí málinum og hvat tí málinum viðvíkur, hevur tað málið ongan áhuga, tí tað var ein annar løgmaður, sum hevði ábyrgdina av tí.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni.

Gestur Hovgaard hevur ongar viðmerkingar.

– Eg kann bara staðfesta, at eg havi ikki fingið starvið, sigur hann.

Annars hevur hann ikki hoyrt eitt orð aftur frá um starvið. Hann hevur heldur ikki fingið at vita, hví hann ikki fekk starvið.

Og tað er í hvussu so er ikki í samsvari við setanarpolitikkin. Tí har stendur:

Svar uppá umsókn um starv eigur at verða givið sum skjótast, og helst í seinasta lagi tríggjar vikur eftir, at umsóknarfreistin var úti. Ber ikki til at halda hesa reglu, skal umsøkjari – helst longu í skrivinum, ið váttar, at umsóknin er móttikin – fáa boð um nær endaligt svar er væntandi. Avgerðin eigur ikki at verða almannakunngjørd, fyrr enn allir umsøkjarir hava fingið boð um avgerðina.

Og víðari stendur í almenna setanarpolitikkinum:

## Grundgevingar

Noktandi svar skulu vera skrivlig og grundgivin.

Í grundgevingini skal verða kunnað um støði undir avgerðini. T.d. hví mett er, at førleikin hjá tí, ið settur er í starvið, svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki er settur – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja.